# Beinta skerdi Falkin



*Mynd: Álvur Haraldsen*

**5-MANNAFØR GENTUR** Eftir sannførandi sigur í Sørvági eru genturnar úr Miðvági stórfavorittar at vinna FM heitið

**Tróndur Arge**

Tað hilnaðist væl hjá vágagentum á Vestanstevnu. Beinta úr Miðvági vann sannførandi sigur, og harvið eru miðvágsgentur tvey stig frammanfyri næsta kappingarneyta í FM kappingini.

Hóast Falkur bara hevur vunnið eina ferð í summar – á Sundalagsstevnu í Hvalvík – so er Falkur framvegis við í kappingini um FM, men nú fer at tátta í hjá gentunum í Sundalagnum, sum á Ólavsøku bæði skulu vinna á Beintu og fáa hjálp aðra staðni frá, um tað skal eydnast at fáa fatur á meistaraskapinum.

Í Sørvági vóru Ørnin úr Sandavági, Falkur úr Sundalagnum og Sílið úr Havn leingi væl við, og Ørnin var fremst eftir startspurtin.

Sum róðurin leið, var tað tó eingin ivi. Beinta var fremst, og sigurin gjørdist rættuliga sannførandi. Falkur var næstfremst, og Ørnin endaði á bronsuplássinum.

Eftir kappingarlok vísti tað seg, at Sílið, sum annars var væl við í kappingini, hevði fingið gula kortið fyri triðju ferð í ár, og harvið varð báturin kolldømdur í róðrinum og misti harvið plaseringina og stigini. Tað ber við sær, at Sílið, sum vann á Norðoyastevnu, ikki hevur møguleika at vinna gull og silvur.

*trondur@sosialurin.fo*

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Beinta | 05:21.16 |
| 2 | Falkur | 05:24.20 |
| 3 | Ørnin | 05:28.13 |
| 4 | Tjaldrið | 05:32.14 |
| 5 | Silja | 05:39.00 |
| 6 | Tambar | 05:45.05 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Beinta | 38 |
| 2 | Falkur | 36 |
| 3 | Sílið | 28 |
| 4 | Ørnin | 22 |
| 5 | Tjaldrið | 21 |
| 6 | Silja | 12 |
| 7 | Tambar | 8 |
| 8 | Fípan Fagra | 2 |



*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Teistin er fyrsti meistarin

**BARNARÓÐUR GENTUR** Men í Sørvági vann Drekin, meðan nýklækti meistarin endaði á fjórða plássi

**Tróndur Arge**

Argjagentur umborð á 5-mannafarinum Teistanum tryggjaðu sær í Sørvági FM heitið í barnaróðri. Hetta er fyrsta ferðin yvirhøvur, at ein bátur hevur vunnið hesa kapping, sum í ár er á skránni fyri fyrstu ferð.

Nú bara ólavsøkuróðurin restar, er Teistin níggju stig frammanfyri næstfremsta bátin, og tá ið tað á Ólavsøku ikki ber til at vinna fleiri enn sjey stig, vil tað siga, at Teistin er FM vinnari.

Teistin vann fimm tær fyrstu kappingarnar, men á Vestanstevnu hilnaðist tað ikki so væl. Í sera tættari kapping var Drekin hjá Havnar Róðrarfelag fyrstur á mál. Drekin, Beinta og Spógvin fóru um málið mest sum í senn, og á fjórða plássið - ein hálvan skut aftanfyri - kom nýggi FM vinnarin á mál.

Sigurin í Sørvági ber við sær, at Drekin er næstfremstur í FM kappingini.

*trondur@sosialurin.fo*

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Drekin | 02:36.10 |
| 2 | Beinta | 02:36.11 |
| 3 | Spógvin | 02:36.24 |
| 4 | Teistin | 02:37.16 |
| 5 | Fípan Fagra | 02:40.13 |
| 6 | Ørnin | 02:41.03 |
| 7 | Jallurin | 02:41.04 |
| 8 | Firvaldur | 02:43.24 |
| 9 | Sandingur | 02:49.01 |
| 10 | Frúgvin | 02:51.04 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Teistin | 39 |
| 2 | Drekin | 30 |
| 3 | Spógvin | 29 |
| 4 | Fípan Fagra | 24 |
| 5 | Beinta | 15 |
| 6 | Ørnin | 15 |
| 7 | Jallurin | 12 |
| 8 | Tambar | 2 |
| 9 | Svanur | 1 |
| 10 | Firvaldur | 1 |

# Títlingur verjir Havnina

**BARNARÓÐUR DREINGIR** Tveir bátar hjá Havnar Róðrarfelag vóru frammanfyri allar hinar í fyrsta FM róðrinum í Sørvági, og nú skal vilja illa til, um Títlingur ikki skal vinna FM

**Tróndur Arge**

Kanska er hetta árið tað lakasta hjá Havnar Róðrarfelag nakrantíð. Men í kappingini millum dreingjabátar í barnaróðrinum hevur hilnast væl hjá Títlingi, og leygardagin gekk tað so væl hjá Havnar Róðrarfelag í hesi kappingini, sum tað ongantíð hevur gjørt fyrr í summar.

Títlingur var fremstur og harvið stevnir hesin báturin beint ímóti FM heitinum.

Merkisvert var tað, at ein annar bátur hjá Havnar Róðrarfelag, Drekin, var næstfyrstur. Munurin teirra millum var meiri enn ein hálv bátslongd, og munurin frá Drekanum og aftur til Havfrúnna úr Vestmanna, sum var nummar trý, var ein skutur.

Títlingur er ikki FM vinnari enn, men nú skal vilja meiri enn illa til hjá havnardreingjunum, um teir ikki á Ólavsøku skulu vinna FM heitið.

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Títlingur | 02:32.17 |
| 2 | Drekin | 02:34.14 |
| 3 | Havfrúgvin | 02:35.06 |
| 4 | Sandingur | 02:37.05 |
| 5 | Royndin Fríða | 02:37.13 |
| 6 | Jallurin | 02:38.17 |
| 7 | Teistin | 02:39.03 |
| 8 | Tambar | 02:39.07 |
| 9 | Junkarin | 02:42.04 |
| 10 | Frúgvin | 02:43.02 |
| 11 | Dúgvan | 02:44.03 |
| 12 | Heykur | 02:44.10 |
| 13 | Hulda | 02:48.21 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Títlingur | 40 |
| 2 | Havfrúgvin | 36 |
| 3 | Drekin | 32 |
| 4 | Teistin | 21 |
| 5 | Jallurin | 18 |
| 6 | Royndin Fríða | 12 |
| 7 | Sandingur | 6 |
| 8 | Tambar | 3 |
| 9 | Junkarin | 1 |